# Barnakapping

Frá 1. til 24. desember, á aftastu síðu, fer Sosialurin at hava ein spurnarkapping í blaðnum við spurningum úr brettspælinum Manna. Spælið verður skipað soleiðis, at hvønn dag, verða tríggir spurningar at finna her á síðuni. Fyri at verða við í kappingini, mást tú svara spurningunum og senda teir við telduposti til: *manna@sosialurin.fo* **innan annan dagin eftir kl. 08.** Minst ein av spurningum má vera rættur. Eitt brettspæl av Manna verður burturlutað hvønn dag og vinnarin verður kunngjørdur í blaðnum dagin eftir.

Av misgáum skrivaðu vit ikki røttu tíðarfreist í mánadagsblaðnum, so tit kunnu senda svarini til fyrstu tríggjar spurningarnar innan mikumorgun kl. 08.00. Vinnarin verður kunngjørdur í blaðnum mikudagin.




**1. Hvar búðu Jósef og Maria, áðrenn Jesus var føddur?**
**2. Hvussu æt eingilin, sum segði Mariu, at hon skuldi føða Jesus?**
**3. Hvør var kongur í Judea, tá ið Jesus varð føddur?**

*Svarini til hesar spurningar skulu vera okkum í hendi hósmorgunin kl. 08.00. Vinnarin verður kunngjørdur í blaðnum hósdagin.*



















